tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 02.06.2025 kl. 18:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, ~~Eyð Jóna Eidesgaard~~, Arnfinn Bech

Varalimir: Jens Arni Leo Hammerfoss

Ikki møtt: Eyð Jóna Eidesgaard

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 32/25 | 25/00156-2 | Umsókn um byggiloyvi við frávik til bilhús á matrikul 145d, Traðarvegur 160, Trongisvágur |
| 33/25 | 25/00107-1 | Kirkjugarður - tørvs- og støðulýsing 2025 |
| 34/25 | 23/00364-2 | FSR -viðv. stuðulsavtaluni frá 15.10.2021 -útgjald |
| 35/25 | 24/00198-1 | Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -framtíðarætlanir |
| 36/25 | 24/00308-2 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul skúlaári 2025 |
| 37/25 | 25/00027-1 | Mýrifípan -útbygging og dagføringar 2025 |
| 38/25 | 25/00119-1 | Eldradepil & íbúðarbygging á Ryggi í Trongisvági |
| 39/25 | 25/00176-1 | Heilsudepil á Tvøroyri -læknamiðstøð fyri alla Suðuroynna |
| 40/25 | 25/00180-2 | Sjódypp -umsókn um stuðul til áhaldandi verkætlan av baðihús í Tjaldavík. |
| 41/25 | 25/00189-1 | TVK -endurskoðan av lánum hjá Tvøroyrar kommunu |
| **Til kunningar** | | |
| 15/25 | 25/00029-1 | Skattainntøkur 2025 |
| 16/25 | 25/00192-1 | Ung í arbeiði 2025 |

| | | |
|---|---|---|
| 17/25 | 21/00588-41 | Nýgerð av spæliplássi í Froðba |
| 18/25 | 21/00594-1 | Nýggjur skúli |
| 19/25 | 25/00145-2 | Tvøroyrar skúli innbúgv 2025 |
| 20/25 | 25/00166-1 | Umsókn um stuðul til Suðurljóð 2025 |
| 21/25 | 25/00206-1 | Tvøroyrar skúli - umvælingar og dagføringar av skúlagarði |
| | | |

**Kunning til býráðið**
Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Eyð Eidesgaard hevur fráboðað, at hon berst frá at møta til býráðsfundin í dag 2. mai 2025, og hevur hon heitt á Jens Arna Leo Hammerfoss, ið er fyrst valdi tiltakslimur á lista C javnaðarflokkurin til kommunustýrisvalið 20. november 2024, um at møta fyri seg. Jens Arni Leo Hammerfoss hevur havt sæti í býráðnum hetta valskeiði, og verður at taka sæti uttan atkvøðugreiðslu.

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna –

Anita Vibergsdóttir mælir til at málið 25/00119-1 "Eldradepil & íbúðarbygging á Ryggi í Trongisvági" verður tikið av skrá, orsakað av her mangla nakrir upplýsingar, og máli verður tikið uppá á fyrst komandi býráðsfundi. -Einmælt samtykt.

**Til støðutakan**

## 32/25
## 25/00156-2 Umsókn um byggiloyvi við frávik til bilhús á matrikul 145d, Traðarvegur 160, Trongisvágur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.04.2025 | 11/25 |
| 2 Býráðið | 02.06.2025 | 32/25 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur 28. mars 2025 fingið umsókn byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 145d

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar
Bygningskunngerð 2017
Byggisamtykt fyri Tvøroyrar Kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Málið inniheldur eitt minni frávik við atliti til frástøðu til grannamark, og tískil verður mælt til at senda umsóknina til grannahoyring hjá grannanum beint omanfyri.
Sum umstøðurnar eru, verður ikki mett, at byggingin veksur um vandan av eldi.

Deildin mælir til at geva byggiloyvi, tá ið grannin á matr. nr. 145g er hoyrdur, umsitingin ikki hevur móttikið nakað mótmæli, og frávik er latið av býráðnum.
Kemur eitt mótmæli, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur, annars verður tað beint í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. april 2025:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, at senda umsóknina til grannahoyring hjá grannanum beint omanfyri, og at geva byggiloyvi, tá ið grannin á matr. nr. 145g er hoyrdur, umsitingin ikki hevur móttikið nakað mótmæli, og frávik er latið av býráðnum. Kemur eitt mótmæli, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur, annars verður tað beint í býráðið.

**Tekniska deild 12-05-2025:**
08. apríl 2025 fekk grannin á matr. nr. 145g málið til ummælis, orsakað av, at bilhúsið verður bygt nærri tykkara mark enn 2,5m.
Tá ið freistin var úti 28. apríl 2025, var einki hoyringssvar komið.
Mælt verður til at geva byggiloyvi við frávik við atliti til frástøðu til grannamark.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd og Teknisku deild at geva byggiloyvi við frávik við atliti til frástøðu til grannamark.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**33/25**
**25/00107-1 Kirkjugarður - tørvs- og støðulýsing 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2025 | 6/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 31/25 |
| 3 Býráðið | 31.03.2025 | 24/25 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.05.2025 | 12/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 48/25 |
| 6 Býráðið | 02.06.2025 | 33/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 06.03.2025**
Borgarstjórin heitur í telduposti á umsitingina um at reisa málið aftur í teknisku nevnd, við tilmælið um at ógilda býráðssamtyktina frá 30 september 2020 um ikki at víðkað kirkjugarðin undir Akugerði longur eystur.

*Málið var seinast til viðgerðar í Teknisku nevnd hin 4. desember 2024, har tekniska nevnd mælti til, at borgarstjórin fer í eitt samskifti við nærmastu grannarnar hjá kirkjugarðinum fyri at finna eina loysn uppá at víðka verandi kirkjugarð sum skjótast. Eisini mælti tekniska nevnd til, at arbeitt verður víðari við einari loysn uppá aðra staðseting av nýggjum kirkjugarði*

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2025, §619 avsett kr. 5,0 mió.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 10. marts 2025:**
Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá borgarstjóranum. Arbeiðið við at víðka kirkjugarðin longur eystur skal setast í gongd so skjótt sum til ber. Nevndin heitir á teknisku deild at fáa garðin oman ímóti bakkanum víðkaðan eystureftir, og at planta trø ímóti húsunum eystanfyri kirkjugarðin í samráð við nærmastu grannarnar.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá borgarstjóranum og Teknisku nevnd, at víðkað kirkjugarðin á matr.nr 30 longur eystur heilt at matr.nr. 20, 22, 24, 26, 28 so skjótt sum til ber. Málið verður beint í býráðið, við tilmælið um at ógilda býráðssamtyktina frá 30 september 2020.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd og fíggjarnevndini at víðkað kirkjugarðin á matr.nr 30 longur eystur heilt at matr.nr. 20, 22, 24, 26, 28. Heitt verður á umsitingina at byrja at projektera hesa ætlanina við hægstu raðfesting.
**Viðm. Tekniski leiðarin (GM) tann 09.05.2025**
Ástaðarfundur var í kirkjugarðinum undir Akurgerði tann 07.05, har m.o. kommunan og verkfrøðingur vóru umboðaði. Víst varð á bráðfeingis tørvin á gravarplássum, har gravarin gjørdi vart við, at tað nú bert eru 9 dupultgravir eftir í kirkjugarðinum.
Avgjørt varð, at arbeiðið við at víðka kirkjugarðin ikki kann bíða, og tí má kommunan fara í gongd beinanvegin fyri at loysa tann akutta tørvin, ið er á plássum í løtuni og í øllum førum nøkur ár fram.
Ráðgevandi verkfrøðingurin kom við uppskoti um, at kommunan arbeiðir víðari við ætlanini um at staðseta ein nýggjan kirkjugarð á matr.nr. 25c, 25d og 26b.

**Tekniska nevnd 12. maj 2025:**
Nevndin mælir til, at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini, ið fyriliggur. Málið verður beint víðari í býráðið.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd, og heimila umsitingini at arbeiða víðari við fyriliggjandi ætlan, um at staðseta nýggjan kirkjugarð á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Borgarstjórin mælir til at samtykkja tilmælið teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at heimila umsitingini at arbeiða víðari við fyriliggjandi ætlan, um at staðseta nýggjan kirkjugarð á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13. - Einmælt samtykt.

**34/25**
**23/00364-2 FSR -viðv. stuðulsavtaluni frá 15.10.2021 -útgjald**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 4 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 10/25 |
| 5 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 46/25 |
| 6 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 51/25 |
| 7 Býráðið | 02.06.2025 | 34/25 |

**Málslýsing: Kommunsutsjórin 20.11.2023**
Umsókn um rest útgjald er móttikið frá FSR, til neystabýgging.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2023**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 20. november 2023:**
Linn Augustinussen, form. í FSR møtti á fundinum, og greiddi frá um verkætlanina at byggja nýtt neyst á Hvítanesi. Upplýst var at metti kostnaðurin verður kr. 12.5 mió. við øllum.
Bjarni Hammer mælir til at leysgeva játtanina hjá Tvøroyrar kommunu samb. fyriliggjandi avtalu, og at bygginevndin møtur til fund har kunna verður um verkætlanina, og at viðgerða meirkostnaðin.
Einmælt samtykt. -Málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Einmælt samtykt at leysgeva seinastu ætlaðu játtan hjá Tvøroyrar kommunu til bygging av nýggjum neysti á 1. mió. samb. stuðulsavtaluna millum TVK og FSR á depotkonto.

**Býráðið 30. november 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 12.02.2025:**
Ráðgevin, Rógvi Thorsteinsson hjá Tvøroyrar kommunu, hevði biði um undanfund við býráðið 12.02.2025, at taka samanum byggiætlanina, áðrenn fundur var í bygginevndini á Hvítanesi henda sama dagin kl. 16.00.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Borgarstjórin kunnar um, at á fundi í bygginevndini hin 12. feb. bleiv samtykt, at form. í FSR skjótast gjørligt skipar fyri ástaðarfundi har umboð fyri LOA grunnin luttaka. Fíggjarnevndin samtykti einmælt

ikki at leysgeva meira stuðulsjáttan, fyrr enn greiða fæst á, hvat endaligi meirkostnaðurin verður av nýggja neystinum, og hvør parturin hjá LOA grunninum verður av meirkostnaðinum.

**Mentanarnevndin 12. maj 2025:**
Einmælt samtykt at heita á nevndina í FSR at møta á fyrst komandi býráðsfundi at greiða frá verkætlanini á Hvítanes har nýtt kappróðrarneyst verður bygt.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at tilmælið hjá Mentanarnevndini. Stuðulsupphæddin «FÆ2025, §525 á kr. 1.mió» verður viðgjørdur eftirfylgjandi.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Á forfundi við Tvøroyrar býráð í dag 2. Juni 2025, kl. 17.20 vóru møtt forkv. í FSR Kristina Roest saman nevndarlimunum í FSR. Borgarstjórin mælir til, at málið verður tikið upp á einum seinni fundi, tá FSR fær greiðu á, hvat endaligi kostnaðurin verður. -einmælt samtykt

## 35/25
## 24/00198-1 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -framtíðarætlanir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 25.02.2025 | 6/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.04.2025 | 36/25 |
| 6 Býráðið | 01.05.2025 | 28/25 |
| 7 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 50/25 |
| 8 Býráðið | 02.06.2025 | 35/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.07.2024**
Kári Jespersen, nevndarumboð í Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn, *umboðandi Tvøroyrar býráð*, hevur hin 16. Juni 2024 vent seg til kommunustjóran við tilmæli um, at kommunan arbeiðir fram ímóti, soleiðis at tað ber til hjá Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn at realisera uppskotsætlanina, sum Mayfinn Norðoy Cand. Arch. legði fram fyri býráði í sep. 2023 *"Gamla Tvøroyri"*.

Tilmælið hjá Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn er at fremja ætlanina í stigum, har Tvøroyrar kommuna í fyrsta umfari handar Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn gamla Ísvirkið matr.nr 491, umframt at kommunan kannar, hvørt eigarin av matr.nr 494b, gamli Timburhandilin hjá RBT -matr.nr. kann ognast Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn, evt. við at kommunan fremur eitt gerðabýti við matr. nr. 497a & 495.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**<u>Býráðið 17. juli 2024:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað, einmælt samtykt at heimila umsitingini at kanna møguleikar og arbeiða víðari við ætlanini.

**<u>Kommunustjórin 24. Okt.2024</u>**
Kári Jespersen, leiðarin av Skjalasavninum hevur hin 24. Okt. 2024 kunna kommunustjóran um, at eigararnir av gaml. Timburhandlinum eftir Ric. B. Thomsen, matr.nr 494b, hava svara uppá fyrisp. frá Sokn adv. hvørt teir vilja selja henda gamla partin av timburhandlinum til Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn.

Richard og Henrik Thomsen eigarar av timburhandlinum hava givið til kennar, at teir ikki ynskja at fremja gerðabýti við matr. nr. 497a & 495. *(koldepotið)*, men at teir vilja selja gamla timburhandilin fyri kr. 1,0 mió, við treyt um, at teir framhaldandi hava atgongd til niðaru hæddina í 5 ár, uttan leigukostnað.

Um Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn skal ogna sær gaml. timburhandlinum eftir Ric. B. Thomsen, matr.nr 494b, er neyðugt at Tvøroyrar kommuna veitur 100% fíggjarligan stuðul til keypið, og avsetur hetta á FÆ2025.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við, at Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn byrja tilgongd at ogna sær gaml. Timburhandilin á matr. nr 494b, har Tvøroyrar kommuna tryggjar fíggjarligan stuðul smsv. málslýsing dagf. 24. okt. 2024. -Málið verður beint í býráðið sum lukkað mál.

**Býráðið 07. november 2024:**
Tvøroyrar býráð samtykkir einmælt at heimila borgarstjóranum og umsitingini at arbeiða víðari við tilgongdini at loyva Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn at ogna sær gaml. Timburhandilin á matr. nr 494b, har Tvøroyrar kommuna tryggjar fíggjarligan stuðul smsv. málslýsing dagf. 24. okt. 2024. Og heimila borgarstjóranum og umsitingini at kanna, um ognarviðurskiftini av matr. Nr. 491, kunna skifta til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn. Heitt verður á umsitingina at eftirmeta hvørt viðtøkurnar fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn kann broytast til 5 limir har býráðið hevur umboð.

**Tekniski leiðarin (GM) 24.02.2025:**
Forfólkið í Vinnu- og havnanevndini ynskir eina støðulýsing av málinum.

**Vinnu- og havnanevndin 25. februar 2025:**
Nevndin er kunnað um gongdina, og heitir á umsitingina um at fáa málið avgreitt.

**Kommunustjórin 22.04.2025:**
Eyðbjørn Larsen, SOKN ADV., hevur avgreitt treyta skeyti, sum er undirskriv av eigarum av gaml. Timburhandlinum hjá RBT á matr.nr. 494b, og av nevndarform. og skrivara og nevndarlimi og kassameistara í Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

Sum kunna bleiv um 24. okt. 2024: Um Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn skal ogna sær gaml. timburhandlinum eftir Ric. B. Thomsen, matr.nr 494b, er neyðugt at Tvøroyrar kommuna veitur 100% fíggjarligan stuðul til keypið, og avsetur hetta á FÆ2025.

Ongin játtan er avsett á FÆ2025 til Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn sum stuðulsjáttan til keypa gaml. Timburhandlinum.

Kommunustjórin mælir til *-um ynskið hjá Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn er at ogna sær gaml. Timburhandilin-* at Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn kannar, hvørt tað ber til at keypa timburhandilin við lántøku.

**Fíggjarnevndin 25. april 2025:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt at heimila borgarstjóranum at samráðast við eigara av matr.nr. 494b og við form. í Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn um eina ætlan, hvussu keypið kann avgreiðast. Málið verður tikið upp aftur á fyrst komandi fundi í fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 29.04.2025:**
Kári Jespersen, nevndarumboð í Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn og form. fyri verkætlanina at umvæla Pakkhús 18, hevur vent seg til kommunustjóran við upplýsing um, at ynskið er at kommunan garanterar fyri øllum keypspeninginum samsv. avtaluna, ið er gjørd við RBT -eigari av Pakkhús 17 (gamla timburhandlinum).

**Býráðið 01. maj 2025:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini er einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar kommuna stuðlar Tvøroyrar bygda- og sjóvinnusavnið við kr. 1. mió, til keyp av gaml. Timburhandlinum hjá RBT á matr.nr. 494b, samsv. stuðulsumsóknini dagf. 29.4.2025. Stuðulin fyri 2025 verður kr. 500.000,- verður veittur sum eykajáttan av §721 íløgur til bátahavnir. Stuðulin fyri 2026 verður avsettur á FÆ2026.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini. -málið skal hava tvinnar viðgerðir

**36/25**
**24/00308-2 Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul skúlaári 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 47/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 52/25 |
| 4 Býráðið | 02.06.2025 | 36/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27.10.2024**
Umsitingin hevur hin 24.10.2024 móttikið umsókn um stuðul frá Føroya Eftirskúla til virksemið skúlaárið 2025.

Skúlastjórin skrivar í umsókníni at:

*Eg vil við hesari umsókn spyrja Tvøroyrar Kommunu um stuðul fyri skúlaárið hjá Føroya Eftirskúla fyri skúlaárið 2025.*

*Tvøroyrar Býráð hevur verið virkin stuðul av Føroya Eftirskúla síðan skúlabyrjan 2020 og hevur árliga latið 400.000 kr í stuðli! Stuðulin var býttur í tvær serstakar játtanir*

- *Stuðul verður latin til gjald av hølisleigu, ljós og hita til undirvísingarhølir á Sjógøtu 2., kr. 200.000,-*
- *Stuðul verður latin til nýskapandi virksemið og rakstur skúlans. kr. 200.000,-*

*Eg vil við tí við hesari umsókn spyrja Tvøroyrar kommunu um somu upphædd fyri skúlaárið 2025.*

*Virksemi hjá Føroya Eftirskúla er rikið við stuðli frá Uttanríkis og Mentamálaráðnum og næmingagjaldið. Hartil kemur stuðulin frá Tvøroyar kommunu sum ger tað møguligt at reka tílíkt skúlatilboð sum er nýbrot í føroyskari skúlasøgu.*

*Í løtuni ganga 18 næmingar á skúlanum. Næmingarnir koma úr Føroyum, Danmark, Grønlandi og Týsklandi.*

*Tað eru 2 full størv knýtt at skúlanum, umframt fleiri tímasett størv! Í skrivandi løtu eru 13 fólk knýtt at virkseminum hjá Føroya Eftirskúla. Talan er áleið um 4 til 5 ársverk samanlagt.*

*Eru spurningar vil eg fegin svara teimum!*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin og Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar.
*Kapittul 6, Fígging av rakstri og íløgum*
*§ 17. Virksemið hjá eftirskúlunum verður lutvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. írestandi fígging skal útvegast við næmingagjaldi og/ella privatum stuðli.*
*Stk. 2. Landskassans partur er:*
*1. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latín í mesta lagi 70% av kostnaðinum.*
*2. Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Avsett á FÆ2025, 418, Eftirskúlin í alt kr. 400.000,-, har av leigugjald fyri Sjógøtu 2, kr. 153.562,-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 25. november 2024:**
Einmælt samtykt at lata stuðul til Føroya Eftirskúla fyri skúlaárið 2025 á kr. 400.000,- samsv. Umsókn 24.10.2024. Heitt verður á Føroya Eftir skúla um at innsenda roknskap, áðrenn stuðuls játtanin verður flutt. – Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentanarnevndin 12. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað, og mælt verður til at útgjalda stuðulin samsv. umsókn 24.10.2024. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at veita stuðul til Føroya Eftirskúla kr. 400.000,-. Játtanin verður veitt av FÆ2024, §418. Málið verður beint í býráðið, har skúlastjórn møtir at greiða frá gongdini í Føroya Eftirskúla.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Á forfundi við Tvøroyrar býráð í dag 2. Juni 2025, kl. 17.00 møtti skúlastjórin fyri Føroya Eftirskúla, Pól Arni Holm at greiða frá um Føroya Eftirskúla. Kristin Michelsen mælir til at útseta hetta mál, til greiða fæst á hvørja ætlanir Barna og Útbúgvingarmálaráðið hevur við Føroya Eftirskúla -einmælt samtykt

**37/25**
**25/00027-1 Mýrifípan -útbygging og dagføringar 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.02.2025 | 4/25 |
| 2 Sosiala nevnd | 21.05.2025 | 23/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 43/25 |
| 4 Sosiala nevnd | | |
| 5 Býráðið | 02.06.2025 | 37/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 14.01.2025**
Tá Tvøroyrar býráð viðgjørdi støðulýsingina av barnagarðstørvinum -*mál 23/00268 Mýrifípan - støðulýsing av barnaansingini juni 2023, 2024*- bleiv samtykt, at fyri kunna nøkta tørvin á barnagarðsplássum, er neyðugt at útbyggja barnagarðin.

Tvøroyrar býráð samtykti hin 26. sep. 2024, at umsitingin til komandi fundi í sosialu nevnd leggur fram uppskot til bygging/útbygging av barnagarðinum og útiøkinum, samsvarandi tørvin á 20 børnum afturat verandi. Hetta sum ein liður í avtaluni við Hovs- og Fámjins Kommunu um barnaansing.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ókent

**Tilmælið:**
Mælt verður til, at umsitingin saman við leiðsluni í barnagarðinum Mýrifípan fær heimild -*í fyrsta umfari*- at heita á ark. fyritøkuna, ið hevur tekna verandi barnagarðin, um at fremja uppskot, ið nøkta tørvin, og eftirfylgjandi verða løgd fyri býráðnum til støðutakan.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað, og verður tikið upp á einum seinni fundi.

**Sosiala nevnd 21. maj 2025:**
Forkv. í sosialunevnd mælir til at byrja uppá útbyging samsv. kostnarmeting og uppskot hjá BRIM kr. [redacted], og at byrja verður uppá lendisarbeiði samsv. uppskot hjá BRIM kr. [redacted]. Avsett er [redacted] á FÆ2025. Mælt verður til at fíggja møguligan meirkostnað av innistandandi. -Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Borgarstjórin mælir til, at BRIM projekterar og bjóðar arbeiðini út hvør sær. Býráðið tekur støðu til innkomin tilboð áðrenn arbeiðini verða sett í gongd. Einmælt samtykt. -málið verður beint í býráðið sum lukka mál.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Arnfinn Bech mælir til at broyta fyriliggjandi ætlan, soleiðis at henda verður staðsett longur eystur, og ikki er til ampa fyri framtíðarætlanir við Stórá.

**Atkvøtt verður um broytingar uppskot frá Arnfinn Bech**
Fyri eru Arnfinn Bech
Ímóti eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen,
Blankt: Barbara Tausen, Bjarni Hammer og Jens Arni Leo Hammerfoss
**Uppskoti ikki samtykt.**

**Atkvøtt verður um tilmælið hjá fíggjarnevndini**
Fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer og Jens Arni Leo Hammerfoss
Ímóti eru: Ongin
Blankt: Barbara Tausen og Arnfinn Bech
**Uppskoti samtykt.**

**38/25**
**25/00119-1 Eldradepil & íbúðarbygging á Ryggi í Trongisvági**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.03.2025 | 13/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 32/25 |
| 3 Sosiala nevnd | 09.04.2025 | 18/25 |
| 4 Sosiala nevnd | 21.05.2025 | 21/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 49/25 |
| 6 Býráðið | 02.06.2025 | 38/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09.03.2025**
Forkv. í sosialu nevnd hevur heitt á umsitingina um at byrja uppá fyrireiking av bygging av Eldradepil & íbúðarlonum á Ryggi í Trongisvági.

**Verkætlanin verður lýst, sum verandi í tveimum byggistigum.**

**Byggistig 1:**
Byggistigið inniheldur íbúðir úr 35m2 til einstakar borgarar upp í 64 m2 til tveir borgarar. Íbúðirnar verða bygdar við øllum vanligum hentleikum, og verða eisini gjørdar til fólk við rørslutarni og eldri sum heild. Nýmótans fráboðanarskipanir verða knýttar at íbúðunum, so at boðað verður frá, um okkurt óvanligt er.

Felagshús verður knýtt at íbúðunum, ið er hugsað sum samlingsstað fyri borgarar í íbúðunum og eisini eldri borgarar uttanífrá til ymisk tiltøk og viðgerðir so sum fysioterapi, eldrafimleik o.tíl.

**Byggistig 2:**
Byggistig 2 fevnir um eitt røktarheim til 15 røktarkrevjandi borgarar, ið verður partur av eldradeplinum,og kemur m.a.at innihalda 15 kømur, umframt neyðugar almennar funktiónir. Miðan av bygninginum verður yvirdekkað felagsøki við grønum økjum og uppihaldsøkjum. Verkætlanin er hóttað soleiðis, at møguligt er at byggja út, um tørvur verður á tí. Íbúðirnar, felagshúsið og røktarheimið eru staðsett um eina depilsmiðju, og kann depilin útbyggjast til tað tvífalda ella meira.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin játtan er avsett á FÆ2025 til verkætlanina

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt, at bjóða umboðum fyri MTV byggivirkið á fund við Tvøroyrar býráð fyri at greiða nærri um ætlanina.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Sosialu nevnd.

**Sosiala nevnd 09. april 2025:**
Málið verður útsett til fyrst komandi fund.

**Sosiala nevnd 21. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at hoyra hjá løgfrøðingi, hvørjar heimildir og ásetingar kommunan skal fyrihalda seg til við hesari ætlan. Væntandi verður málið klárt at leggja fyri komandi býráðsfund.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Borgarstjórin kunnar um málið, eftir at hann hevur samskift við løgfrøðingin hjá Kommunufelagnum. Málið verður tikið uppaftur á næsta býráðsfundi eftir tilmælið frá Anitu Vibergsdóttir. -einmælt samtykt

**39/25**
**25/00176-1 Heilsudepil á Tvøroyri -læknamiðstøð fyri alla Suðuroynna**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.04.2025 | 35/25 |
| 2 Býráðið | 01.05.2025 | 31/25 |
| 3 Sosiala nevnd | 21.05.2025 | 22/25 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 44/25 |
| 5 Býráðið | 02.06.2025 | 39/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.04.2025**
Umsitingin hevur arbeitt við ætlan um hvussu Tvøroyrar kommuna kann loysa avbjóðingarnar viðv. verandi heilsudeplinum á Tvøroyri. Tvøroyrar býráðið samtykti hin 27. februar 2025, at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlan um at byggja nýggja kommunulæknamiðstøð á Tvøroyri. Ætlanin tekur støði í tørvslýsingini hjá virkandi kommunulæknum, sum vísa á, at tørvur er á einari læknamiðstøð fyri alla Suðuroynna.

Eisini hevur løgtingið samtykt nýggja lóggávu "Løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum"

**Í nýggju lóggávuni er ma. ásett:**

***Kapittul 1, Heilsutænastur og heilsuøkir***
***§ 1.*** *Landsstýrisfólkið skipar landið í heilsuøkir, ásetur nærri reglur um tal á heilsuøkjum og hvussu hesi landafrøðiliga verða skipað.*

***§ 2.*** *Heilsutænastur frá kommunulækna og øðrum heilsustarvsfólki verða veittar borgarum í heilsuøkinum, undir hesum kanningar, viðgerð, heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tilboð og ráðgeving.*

***§ 3.*** *Í hvørjum heilsuøki kring landið verða skipaðar ein ella fleiri heilsumiðstøðir, sum eru høli, har heilsutænastur í nærumhvørvinum, sambært hesi løgtingslóg, verða veittar.*
*Stk. 2. Landsstýrisfólkið tekur, í samráð við kommunurnar í heilsuøkinum, avgerð um staðseting og tal á heilsumiðstøðum í heilsuøkinum.*
*Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur harumframt nærri reglur um innihaldið í heilsumiðstøðum, m.a. reglur um tænastur, dygdarkrøv, starvskrøv og reglur um kunningartøkni.*

***§ 4.*** *Kommunurnar í heilsuøkinum útvega og viðlíkahalda hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum, samanber § 3.*

***§ 5.*** *Kommunurnar í heilsuøkinum senda í felag uppskot til landsstýrisfólkið um antin at byggja hølir, umbyggja ella útbyggja verandi hølir ella leiga hølir, undir hesum uppskot til at innrætta og staðseta hølir. Stk. 2. Metir landsstýrisfólkið, at tørvur er á at útvega hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum sambært hesi løgtingslóg ella víðka um verandi hølir, kann landsstýrisfólkið*

*heita á kommunurnar í heilsuøkinum um at senda sær uppskot um bygging, umbygging ella útbygging ella uppskot um leigumál.*

***§ 6.** Landsstýrisfólkið góðkennir øll byggimál, umbyggingarætlanir og útbyggingarætlanir og leigumál, undir hesum uppskot til at innrætta hølini. Stk. 2. Landsstýrisfólkið er við í verkætlanini frá hugskotsuppriti til góðkenning. Heilsutrygd er við í verkætlanini frá tí, at góðkent er, til hølini verða tikin í nýtslu.*

***§ 7.** Kommunurnar rinda fyri at byggja, umbyggja ella útbyggja hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum. Somuleiðis rinda kommunurnar fyri at leiga hølir.*

***§ 8.** Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur byggimálum viðvíkjandi og um støðið á hølum til heilsutænastur í nærumhvørvinum.*

***§ 9.** Kommunurnar í heilsuøkinum útvega innbúgv til hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum. Kommunurnar rinda kostnaðin av hesum. Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvat innbúgv talan er um sambært stk. 1. Landsstýrisfólkið ásetur eisini nærri reglur um rakstur og viðlíkahald av innbúgvi.*

***§ 10.** Heilsutrygd útvegar tól og amboð til hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum sambært hesi løgtingslóg. Landið rindar kostnaðin av tólum og amboðum. Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvørji tól og amboð talan er um sambært stk. 1. Landsstýrisfólkið ásetur eisini nærri reglur um rakstur, viðlíkahald og eftirlit við tólum og amboðum.*

**Í uppskot til nýggja kunngerð um at um at skipa landið í heilsuøkir og staðseta heilsumiðstøðir er ásett:**

§ 1. Landið verður skipað í 5 heilsuøkir:
1) Heilsuøki 1: Fugloyar kommuna, Viðareiðis kommuna, Kunoyar kommuna, Hvannasunds kommuna, Klaksvíkar kommuna, Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna.
2) Heilsuøki 2: Runavíkar kommuna, Nes kommuna og Sjóvar kommuna.
3) Heilsuøki 3: Sørvágs kommuna, Vága kommuna, Vestmanna kommuna, Kvívíkar kommuna, Sunda kommuna, Eiðis kommuna og Tórshavnar kommuna (bert Kollafjørður, Signabøur og Oyrareingir).
4) Heilsuøki 4: Tórshavnar kommuna (undantikið Kollafjørður, Signabøur og Oyrareingir), Skopunar kommuna, Sands kommuna, Skálavíkar kommuna, Húsavíkar kommuna og Skúvoyar kommuna.
**5) Heilsuøki 5: Hvalbiar kommuna, Tvøroyrar kommuna, Fámjins kommuna, Hovs kommuna, Porkeris kommuna, Vágs kommuna og Sumbiar kommuna.**

§ 2. Í heilsuøkjunum verða staðsettar ein ella fleiri heilsumiðstøðir.

5) Heilsuøki 5: heilsumiðstøðin staðsett á Tvøroyri verður nevnd Heilsumiðstøðin á Tvøroyri og heilsumiðstøðin staðsett í Vági verður nevnd Heilsumiðstøðin í Vági.

§ 3. Henda kunngerð kemur í gildi 1. Juni 2025.

Virkandi kommunulæknar upplýsa í skrivi dagf. 29.01.2025 til borgarstjórar í Suðuroynni.
*Eina nýggj læknamiðstøð fyri alla oynna. Læknarnir eru samdir um, at fyri at betra um umstøðurnar, skal ein nýggj læknamiðstøð fyri alla oynna byggjast. Tað er ikki nøktandi at betra um og útbyggja núverandi læknamiðstøðir í Vági ella á Tvøroyri. Nógvir fyrimunir eru við, at læknarnir arbeiða undir einum taki: - Fleiri starvsfelagar, ið skapar eitt spennandi, áhugavert og*

*mennandi arbeiðspláss. - Tað lættir um tungu arbeiðsbyrðuna, tá fleiri eru at lyfta uppgávuna. - Tað verður lættari hjá læknunum at fáa møguleika at fara á skeið og halda frí, tí fleiri læknar kunnu traðka til. - Møguleiki fyri felags undirvísing/endurútbúgving og menning, tá fleiri starvsfólk eru. - Møguleiki fyri at samstarva um dýr tól, t.d. ultraljóð apparat og EKG. - Felags høli til konferensur, felags undirvísing og skeið. - Møguleiki fyri at fáa fleiri útbúgvingarlæknar í starv, sum gevur eitt fjølbroytt og stimbrandi arbeiðsumhvørvi*

**Lógargrundarlag:**
"Løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum" -og
Løgtingslóg um kommunulæknaskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2015

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ókent

**Tilmælið:**
Umsitingin mælir til, at arbeitt verður víðari við ætlan hjá Brim, ark. v/Páll Holm Lave, um bygging av heilsudepli á Tvøroyri, ið kann rúma tørvin fyri alla Suðuroynna, samsv. lóggávu.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. april 2025:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt at arbeiða víðari við uppskotinum hjá BRIM Arkitektum, og at bjóða umboð fyri læknum og starvsfólki til ein kunnandi fund um uppskotið.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Varaborgarstjórin kunnaði um málið.

**Sosiala nevnd 21. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunna. Sosiala nevnd mælir einmælt til at taka undir við fyriliggjandi uppskotið hjá BRIM, og at ætlanin verður sent til Heilsumálaráðið til kunnig. Sosiala nevnd mælir einmælt til at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Fíggjarnevndin mælir til, at Sosiala nevnd, bjóðar landstýriskvinnuni í heilsumálum á fund á Tvøroyri, at viðgerða nýggja heilsudepilin á Tvøroyri. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

## 40/25
## 25/00180-2 Sjódypp -umsókn um stuðul til áhaldandi verkætlan av baðihús í Tjaldavík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 54/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 55/25 |
| 3 Býráðið | 02.06.2025 | 40/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 23.04.2025**
Áhugafelagið Sjódypp hevur sent umsitingini umsókn um stuðul til til áhaldandi verkætlan í Tjaldavík at byggja báðihús við hartilhoyrandi útbúnaði.

Sjódypp skriva ma. at:

> *Vit í áhugafelagnum Sjódypp søkja um stuðul til áhaldandi verkætlan okkara í Tjaldavík.*
> *Í 2024 lat baðihúsið upp alment, og vit fingu avgreitt hópfígging okkara gjøgnum Íverksetanarhúsið í Klaksvík.*
> *Vit eru eitt av teimum størri áhugafeløgunum í suðuroynni, og vit hava í dag 108 limir.*
>
> *Baðihúsið er opið fyri limir 3 ferðir um vikuna, og harumframt verður húsið leigað út til privat tiltøk og ítróttarfeløg. Ítróttarfeløg fáa serprís, tá tey leiga baðihúsið. Húsið verður eisini væl vitjað av gestum, t.d. ferðafólkum og gestum hjá limum. Limatalið í felagnum hevur verið støðugt vaksandi, síðani húsið lat upp.*
>
> *Næsta stig í okkara ætlan er at byggja ein tilbygning við vesi.*
> *Tá tað er avgreitt, verður síðsta stig at byggja eina trygga flótibrúgv tætt at húsinum.*
>
> *Vit vilja hervið søkja um stuðul til bygging av tilbygninginum.*

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Stuðul til mentan FÆ2025, §522

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Mentanarnevndin 12. maj 2025:</u>**
Einmælt samtykt at lata kr. 15.000,- í stuðul.

**<u>Fíggjarnevndin 26. maj 2025:</u>**
Borgarstjórin mælir til, at málið verður beint í býráðið. Einmælt samtykt.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Atkvøtt verður um tilmælinum hjá Mentanrnevndini at veita kr. 15.000,- í stuðul til Sjódypp.
Fyri eru: Anita Vibergsdóttir, Barbara Tausen, Alvi Mortensen, Jens Arni Leo Hammerfoss, Bjarni Hammer og Arnfinn Bech
Ímóti: ongin
Blankt: Kristin Michelsen
Tilmælið hjá mentanarnevndini er harvið samtykt: 6/0/1 (fyri/ímóti/blankt)

**41/25**
**25/00189-1 TVK -endurskoðan av lánum hjá Tvøroyrar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 40/25 |
| 2 Býráðið | 02.06.2025 | 41/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 04.05.2025**
Umsitingin er í einari tilgongd at endurskoða lán hjá Tvøroyrar kommunu, og hevur í hesum sambandi móttikið tilboð frá banka við kunning/tilboð um endurfíggjaðan av lánum.

Umfígging og lántøka, 2025 - lántøka mai 2025, frágreiðing um málið:
Vísandi býráðssamtykt 1. mai 2025, -viðv. mál um lántøku (25/00135 "Keyp av ognar partinum hjá Føroya Banka av matr. nr 374, á Sjógøtu 2")- verður hervið heitt á fíggjarnevnd og býráð um at umsitingin fær heimild at taka lán upp á kr. 15 mió. til keyp og fígging av umbygging av bygninginum á Sjógøtu 2, umframt til at fremja ætlaðu broyting á kringøkinum 373b, samsv. uppskotið hjá BRIM ark.

Myndugleikagóðkenning: Av tí at skuldin er niðanfyri álíkningina, er ikki neyðugt at innheinta formalia og loyvir mótvegis landsstýrinum ísbv. lántøkuna.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 43. Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum. Stk. 2. Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lántitreytunum

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Lántøkan upp á 15 mió.kr. fer til keyp og fígging av umbygging av bygninginum á Sjógøtu 2, umframt til at fremja ætlaðu broyting á kringøkinum 373b, samsv. uppskotið hjá BRIM ark.

**Tilmælið:**
Mælt verður til, at fíggjarnevndin og býráðið geva umsitingini heimild at taka upp lán á kr. 15 mió., og heimild at arbeiða víðari við lántøku, ið gevur tað lægstu rentuna og lagaligastu fíggjanveitingina.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at heimila umsitingini at upptaka lán upp til kr. 15. mió samsv. tilmælið.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Einmælt samtykt til mælið hjá fíggjarnevndini.

**Til kunningar**

## 15/25
## 25/00029-1 Skattainntøkur 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2025 | 4/25 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 1/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 2/25 |
| 4 Býráðið | 27.02.2025 | 4/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 3/25 |
| 6 Býráðið | 31.03.2025 | 7/25 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.04.2025 | 6/25 |
| 8 Býráðið | 01.05.2025 | 12/25 |
| 9 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 7/25 |
| 10 Býráðið | 02.06.2025 | 15/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2025**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2024/2025

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025/2026

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 01. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Málið umrøtt og kunnað

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið umrøtt og kunnað

**16/25**
**25/00192-1 Ung í arbeiði 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 58/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 58/25 |
| 3 Býráðið | 02.06.2025 | 16/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 05.05.2025**
Mælt verður til at Tvøroyrar kommuna aftur í ár 2025 bjóðar ungum arbeiði í teirra summarfrítíð. Mælt verður til, at halda fram at lata tilboðið vera galdandi fyri skúlaungdómar í Tvøroyrar Kommunu, har hvør umsøkjari fær í mesta lagi arbeiði í tvær vikur.

**Lógargrundarlag:**
"Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 4. mai 2017" § 49. 1) Børn, sum ikki eru fylt 15 ár, kunnu ikki vera sett í arbeiði, sbr. tó stk. 8-9. Stk. 2. 1) Tá ið ung undir 18 ár verða sett í arbeiði, skal tað í sambandi við skipan og útinnan av arbeiðinum takast atlit til aldur, menning og heilsustøðu hjá tí unga, og at tann ungi hevur møguleika at røkja sína skúlagongd.

Arbeiðið hjá Tvøroyrar kommunu er ætlað fyri ung í bólkinum 15-16 ár.
Hettar merkir, at fyri at tú kanst luttaka í Ung í arbeiði, skalt tú:

- verða fylt/ur 15 ár, áðrenn tú meldar teg til, tó
- ikki fylla 18 ár í tí árinum, tú meldar teg til
- verða sinnað/ur og tøk/ur at arbeiða í tvær vikur í tínari summafríð.

**Fíggjarligar avleiðingar: Avsett játtan er á FÆ2025, kr. 500.000,-**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. maj 2025:**
Einmælt samtykt at seta tiltakið ung í arbeiði á skrá 2025.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at seta tiltakið ung í arbeiði á skrá 2025.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**17/25**
**21/00588-41 Nýgerð av spæliplássi í Froðba**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 12 Býráðið | 02.06.2025 | 17/25 |

**Málslýsing:**
Útgrevstur er byrjaður.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Útgrevsturin er ikki við í tilboðnum frá Arta.
Verður mett at kosta uml. 100.000 kr

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 15. september 2022:**
Nevndin er kunnað um at útgrevstur er byrjaður í Froðba.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. oktober 2022:**
Nevndin er kunnað um at graviarbeiðið er liðugt, og at vit hava fingið rokning áljóðandi 158.000 kr. v/MVG

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 19. april 2023:**
Nevndin er kunnað um, at spæliplássið er samlað á Hjalla, og klárt at senda til økið, men Arta er eitt sindur afturúr í tíðarætlanini vegna verður.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. oktober 2023:**
Nevndin er kunnað um, at arbeiðið er í gongd.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. januar 2024:**
Tekniska deild innheintar prís uppá fallundirlag í Froðba, so at eykajáttan at samtykkjast.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 08. februar 2024:**
Nevndin er kunnað um avtala er gjørd við lokalan veitara um at arbeiða víðari við málinum.
Arbeiðið krevur, at tað uml. 10 hitastig.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 11. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunna, nevndin ynskir eisini tilboð uppá fallundirlag av gummi granulat til alt økið.
Málið verður tikið upp á einum seinni fundi.

**Tekniska 16-04-2024**
Mælt verður til at taka av tilboð uppá fallundirlag frá JSS / Arctic Import áljóðandi 211.592,30 u/MVG.
Harafturat skulu keypast betongflisar, og arbeiðið skal útinnast.
Í FÆ24 er eingin játtan til endamálið.
Mett verður, at tað er neyðugt at fáa eina eykajáttan uppá 450.000 kr

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. april 2024:**
Samtykt at mæla til at fáa eina eykajáttan uppá 450.000 kr, og at seta gongd í arbeiðið skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini, og at fíggjingin verður veitt av játtan §619. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin og fíggjarnevndini at veita eykajáttan á kr. 450.000,- av §619 til liðuggerð av spæliplássinum í Froðba.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð, at veita eykajáttan á kr. 450.000,- av §619 til liðuggerð av spæliplássinum í Froðba

**Kommunustjórin 28.05.2025:**
Mælt verður til at áseta ein dag, har spæliplássi verður tikið alment í brúk.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**18/25**
**21/00594-1 Nýggjur skúli**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 12 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 60/25 |
| 13 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 47/25 |
| 14 Býráðið | 02.06.2025 | 18/25 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 10. oktober 2021)**
Forkv. í Mentanarnevndini Anita Vibergsdóttir ynskir málið at byggja nýggjan fólkaskúla verður sett á skrá og viðgjørt.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019
- *Kapittul 6, Fyrisitingin §47. Stk. 5. Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygging og umbygging av verandi skúlum, smb. § 57, 4. stk.*
- *Kapittul 7, Meginfyrisiting og yvirumsjón §57. Stk. 4. Landsstýrismaðurin góðkennir øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. oktober 2021:**
Málið verður beint í býráðið sum eitt lukka mál.

**Mentanarnevndin 05. april 2022:**
Einmælt samtykt at byrjanin uppá nýggjan skúla verður at byrja, við støði verandi samtykt. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunna. Einmælt samtykt, at málið verður beint aftur í Mentanarnevndina.

**Mentanarnevndin 10. maj 2022:**
Einmælt samtykt at umsitingin vendir seg til Fuglafjarðar kommunu, og bjóða umboðum fyri skúlabyggingin í Fuglafjørði á vitjan hjá Tvøroyrar býráð, at greiða frá tilgongdini at byggja nýggjan skúla, nú Tvøroyrar kommuna ynskir at byggja nýggjan skúla á Tvøroyri.

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Kommunustjórin, Fróði Mortensen kunnar um málið.
Málið verður tikið upp aftur á næsta fundið.

**Mentanarnevndin 13. februar 2023:**
Forkv. mælir til at byrja verður ein tilgongd at byggja nýggjan skúla á Tvøroyri, har ein tørvsmeting verður gjørd, og støðu lýsing verður gjørd av verandi bygningum. Einmælt samtykt.
Málið verður beint í býráði

**Býráðið 20. februar 2023:**
Atkvøtt var um tilmælið hjá mentanarnevndini, fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Súsanna Bertholdsen og Bjarni Hammer. Atkvøddi blankt Alvi Mortensen og Kristina Roest. Tilmælið hjá mentanarnevndini er sostatt samtykt.

**Mentanarnevndin 16. marts 2023:**
Forkv. mælir til at ein bygginevnd verður vald, ið skal lýsa tørvin hjá skúlanum.
Bygginevndin skal taka støði í:

- Tørvslýsingini, skal bygginevndin koma við tilmælið um heildarætlan, bygging, uttanumøkið og innrætting av skúlanum.
- Umframt nýggjan forskúla, grund- og miðdeild, skulu atlit takast til framtíðar dagføringar av hádeild.
- Byggiskráðin skal eisini umfata umstøður til tónleik, felagsrúm/aula og hølir til sergreinir.
- Bygginevndin skal samskifta við allar viðkomandi partar og soleiðis tryggja, at allir viðkomandi upplýsingar verða við í tilmælinum.
- Byggiskrá lýsir tíðarætlan og kostnað
- Og onnur møgulig viðkomandi viðurskiftir.

Einmælt samtykt. Málið verður beint í býráði.

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Borgarstjórin mælir til at málið verður tikið av skrá til bólkurin, ið arbeiðir við kommunusamanlegging kemur við einum tilmælið um kommunusamanlegging. Jónleyg J. Bech mælir til at tilmælið hjá Mentanarnevndini verður beint fyri býráði sum lukka mál.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Mentanarnevndini: fyri eru Jónley J. Bech, ímóti Kristin Michelsen og Kristina Roest. Tilmælið hjá Mentanarnevndini ikki samtykt.

**Kommunustjórin 16. mai 2023:**
Forkv. í menntanarnevndini ynskir at málið veður tikið upp til nýggja viðgerð. Og á fundi í mentanarnevndin hin 16. mai 2023, var málið umrøtt og metti mentanarnevndin, at tað er av alstórum týdningi, at málið verður tikið upp av nýggjum og bygginevnd verður sett beinanvegin.

Mentanarnevndini mælir til at ein bygginevnd verður vald, ið skal lýsa tørvin og heildarætlan fyri nýggjan skúla á Tvøroyri.

- Í tørvslýsingini, skal bygginevndin koma við tilmæli um bygging, uttanumøki og innrætting av skúlanum.
- Umframt nýggjan forskúla, grund- og miðdeild, skulu atlit takast til framtíðar dagføringar av hádeild.
- Bygginevndin skal samskifta við allar viðkomandi partar og soleiðis tryggja, at allir tørvur, sum nútímans skúlaskapur krevur, verða við í tilmælinum.
- Byggiskrá lýsir tíðarætlan og kostnað.
- Og onnur møgulig viðkomandi viðurskiftir.

**Mentanarnevndin 13. juni 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá forkv. í mentanarnevndini frá 16. mai 2023, at at tað er av alstórum týdningi, at málið verður tikið upp av nýggjum og bygginevnd verður sett beinanvegin. Mentanarnevndini mælir til at ein bygginevnd verður vald, ið skal lýsa tørvin og heildarætlan fyri nýggjan skúla á Tvøroyri.

- Í tørvslýsingini, skal bygginevndin koma við tilmæli um bygging, uttanumøki og innrætting av skúlanum.
- Umframt nýggjan forskúla, grund- og miðdeild, skulu atlit takast til framtíðar dagføringar av hádeild.
- Bygginevndin skal samskifta við allar viðkomandi partar og soleiðis tryggja, at allir tørvur, sum nútímans skúlaskapur krevur, verða við í tilmælinum.
- Byggiskrá lýsir tíðarætlan og kostnað.
- Og onnur møgulig viðkomandi viðurskiftir.

**Mentanarnevndin 12. maj 2025:**
Forkv. greiðir frá, at á fundi við býráðið 1. mai 2025, har skúlastýrið og skúlaleiðslan vóru umboðaði, var lagt fram ynskið frá skúlastýrinum og skúlaleiðsluni, at Tvøroyrar kommuna tekur endaliga støðu til, hvørt byggjast skal nýggjur skúli, ella at haldast skal áfram við at dagføra verandi skúla. forkv. mælir til at býráðslimir og umsiting taka málið upp til viðgerðar á einum temadegi, har støða verður tikin til:

- Um byggjast skal nýggjur skúli
- Staðseting
- Tørv
- Fígging
- Og onnur viðkomandi viðurskiftir

Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**19/25**
**25/00145-2 Tvøroyrar skúli innbúgv 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 33/25 |
| 2 Mentanarnevndin | 15.04.2025 | 42/25 |
| 3 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 50/25 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 45/25 |
| 5 Býráðið | 02.06.2025 | 19/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.04.2025**
Skúlastjórin hevur fráboða í telduposti hin 1. apríl, at hann hevur innheinta 2. tilboð uppá innbúgv, borð og stólar, til Tvøroyrar skúla.

**Lýsing av tilboðum:**
Tilboðini eru stórt sæð eins.
Næmingastólurin er tann sami í báðum tilboðunum. Næmingaborðini eru ikki líka, kvaliteturin á borðunum frá [redacted] betur. Í prísinum frá [redacted] upphang til stólar íroknað, hetta vilja vit ikki hava.

- Prísurin frá [redacted] kr. 556.800,- uttan upphang til stólar og uttan MVG.
- Prísurin frá [redacted] kr. 558.600,- uttan MVG.

**Lógargrundarlag:**
Fólkaskúlalógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2025, §411 er avsett kr- 480.000,- til næmingaborð og stólar.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 07. april 2025:**
Einmælt samtykt at heita á umsitingina at kanna við freist í innverandi viku, hvørt lokalur veitari kann veita borð og stólar av líknandi góðsku og fyri kappimngarføran prís. -málið verður tikið upp eftirfylgjandi á fyrst komandi fundi.

**Kommunustjórin 11.04.2025:**
Umsitingin hevur móttikið tilboð frá lokalum veitara, ið mælt verður mentanarnevndini at taka støðu til.

**Mentanarnevndin 15. april 2025:**
Málið varð umrøtt og kunnað- [redacted] nærri ynskir og krøv hjá skúlastjóranum Jóh Johannesen og vendur aftur eftir páskir. Málið verður tikið upp á seinum seinni fundi.

**Mentanarnevndin 12. maj 2025:**
Mælt verður til at fylgja tilmælinum hjá skúlaleiðsluni og skúlastýrinum, at fara víðari við tilboðnum frá [redacted]

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Mentanarnevndini, skúlaleiðsluni og skúlastýrinum.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá skúlaleiðslu, skúlastýrinum, mentanarnevndini og fíggjarnevndini. - Meirkostnaðurin verður veittur við eykajáttan av §411, íløgur til skúlan "nýggjur skúli"

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**20/25**
**25/00166-1 Umsókn um stuðul til Suðurljóð 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 51/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 53/25 |
| 3 Býráðið | 02.06.2025 | 20/25 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 11.04.2025
Umsókn er móttikin um stuðul til tónleikatiltakið Suðurljóð, sum verður á Tvøroyri tann 30. august 2025.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025, Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. maj 2025:**
Forkv. mælir til at stuðla við kr. 25.000,-, -einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini. -Málið verður beint í býráði

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**21/25**
**25/00206-1 Tvøroyrar skúli - umvælingar og dagføringar av skúlagarði**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 59/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 46/25 |
| 3 Býráðið | 02.06.2025 | 21/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.05.2025**
Forkv. ynskir at viðgerða íløgujáttan 2025, §411, ið er avsett til dagføring á skúlagarðin.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Peningur er játtaður til endamálið í FÆ2025, §411 [redacted]

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. maj 2025:**
Einmælt samtykt at heimila forkv. í mentanarnevndini, Barbara Tausen, saman við tekniska leiðaranum Georg Muller, at arbeiða víðari við einari ætlan hvussu skúlagarðurin kann skipast. Mælt verður til, at umboð fyri skúlastýrið og skúlaleiðsluna verða við í arbeiðsbólkinum.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt tilmæli hjá Mentanarnevndini.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 19:25

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Jens Arni Leo Hammerfoss

Arnfinn Bech